## Albert Ellefsen skal venja fuglfirðingar

Tað verður Albert Ellefsen, sum fer at standa við stýrisvølin hjá fuglfirðingum komandi mánaðirnar Dan Petersen, formaður hjá ÍF, vil ikki gera stórvegis viðmerkingar til uppsagnina av David Jones. Hann staðfestir, at partarnir eru samdir um at fara hvør til sítt, og tíðindaskriv verður sent út, har greitt verður nærri frá uppsøgnini. Albert Ellefsen, sum í fjør bæði var hjálparavenjari og høvuðsvenjari hjá HB, setur seg í venjarasessin í ÍF, og skal royna at vinna felagið burtur frá niðurflyting.

## HB sett nýggjan venjara til Formulaliðið

HB skrivar á heimasíðu sínari, at felagið hevur gjørt av at styrkja venjaratoymið á Formulaliðnum. - Úrslitini hjá felagnum í ovastu deildunum hava ikki verið nøktandi í seinastuni, og til tess at betra um gongdina hevur nevndin tikið avgerð um at styrkja venjaratoymið við, at Sámal Erik Hentze – í HB vanliga nevndur Bagge – verður partur av hesum. Hetta merkir, at Rúni og Bagge koma at standa fyri og taka sær av Formulaliðnum, meðan Áki og Frankie koma at taka sær av 1. deildarliðnum og unglingunum, skrivar HB á heimasíðu sínari.



*B68 og B36 hittust á Svangaskarði 28. mai í 9. umfari. Ta ferðina skoraði B36 einsamalla málið í tíðini, sum dómarin hevði lagt afturat*

B68-B36

# Heimavøllurin er eingin skansi

**Eftir tveir sigrar á rað á útivølli er takið hjá toftamonnum at vinna úrtøku á heimavølli ímóti B36, sum eisini er á aldukambinum**

FÓTBÓLTUR

*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Teir venja sama lið, men sunnudagin skulu teir stríðast fyri at vinna stig ímóti hvørjum øðrum. Talan er um venjararnar hjá U-21 landsliðnum.

Bill Jacobsen er venjari hjá B68, og Heðin Askham er venjari hjá B36. Felags fyri teir báðar er, at teir í tveimum teimum fyrstu umførunum eftir summarsteðgin hava vunnið fulla úrtøku. B68 við sigrum í Klaksvík og Fuglafirði, og B36 við sigrum á HB og á Sandi.

Góða gongdin ber við sær, at B36 tykist vera einasta liðið sum í løtuni er nóg væl fyri at bjóða EB/Streymi av í oddastríðnum, og at B68 er so mikið væl fyri, at teir – fyribils í hvussu so er – hava sloppið sær undan størstu hóttanini av niðurflyting.

Tølini siga, at B68 higartil í ár hevur havt trupulleikar á heimavølli. Av 20 stigum eru bara fimm vunnin á Svangaskarði.

Í Fuglafirði vísti danski Brian Andresen seg við tveimum málum at vera fínan styrk. Konseptið riggar eisini betri við honum í fremstu røð. B68 dúvar nú upp á verjuna og skjótálop. Brian Andresen noyddist av vøllinum í Fuglafirði. Hann verður tó tøkur sunnudagin. Tað verða allir hinir hjá B68 eisini.

Tølini siga eisini, at B36 ikki hevur staðið seg nakað serligt á útivølli. Higartil hevur árstalsfelagið spælt seks útidystir. Tríggjar ferðir er B36 farið til hús við ongum. Tvær ferðir hevur úrtøkan verið full, og eina ferð hevur verið javnleikur.

Í B36 er lagið gott. Felagið tykist vera á rættari kós bæði so og so. Í 2-0 sigrinum á HB noyddist Odmar Færø av vøllinum í 1. hálvleiki, tí hann hevði trupulleikar við knænum. Hann verður í ferðalagnum inn á Toftir. Miðverjin Herbert í Lon Jacobsen hevur verið skaddur í nógvar vikur. Hann venur nú saman við hinum. Súni Olsen verður neyvan tøkur sunnudagin. Haraftur ímóti vísti Ingi Højsted, tá ið hann sunnudagin varð innskiftur, at hann er komin heilt fyri seg aftur eftir langan skaðasteðg.

B68 og B36 hittust á Svangaskarði 28. mai í 9. umfari. Ta ferðina skoraði B36 einsamalla málið í tíðini, sum dómarin hevði lagt afturat.

## Dystir og dómarar

Formula deildin 18. umfar
Sunnudagin 17. august

| | |
|---|---|
| **HB-EB/Streymur:** | Dagfinn Olsen |
| **KÍ-Víkingur:** | Rúni Gaardbo |
| **B71-ÍF:** | Petur Reinert |
| **B68-B36:** | Ransin Djurhuus |
| **Skála-NSÍ:** | Georg Rasmusen |

Støðan frá blaðnum týsdagin skal setast her

1. deild 18. umfar
Leygardagin 16. august

| | |
|---|---|
| **VB/Sumba-Víkingur:** | Lars Müller |
| **NSÍ-07 Vestur:** | Rói Jacobsen |
| **HB-TB:** | Jan Skoradal |
| **KÍ-AB:** | Bárður Mortensen |
| **B68-EB/Streymur:** | Jón Kári í Brekkuni |

Støðan frá blaðnum mánadagin skal setast her